# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Petur Prest

f. 26. nov. 1927 – d. 8. mars 2008

**in memoriam**



*Fall nú frægi vinur vár,*
*oyggjabúgvum bestur,*
*útlagnum tey mongu ár,*
*útisetaprestur.*

*Gjørdi væl so mangan dag,*
*sjúkum kærur gestur,*
*gjørdi stúrin fró og glað,*
*okkar Petur Prestur.*

*Tænti sínum kalli væl,*
*felagsmaður mestur,*
*hollur var í orð og tal,*
*okkar Petur Prestur.*

*Gjørdi ikki mun á mann,*
*tolin vinur treystur,*
*altíð farveg góðan fann,*
*okkar Petur Prestur.*

*Frægur fór um feigdarflúr,*
*ráðsnarur og reystur,*
*setti segl sín síðsta túr,*
*okkar Petur Prestur.*

---

*Blíðan byrð um evstu sýn,*
*Góði Petur Prestur,*
*ílatin títt Himmallín*
*til tín síðsta lestur.*

*Ærað verðið minnið títt,*
*Góði Petur Prestur,*
*sov í moldum søtt og blítt,*
*nú sól tín sakk í vestur.*

pmp



*Myndaeigari: Erling Simonsen*

# Konfirmantar í 1911

**Konfirmantar í Havnar kirkju sunnudagin 1. oktober 1911**

Tey 28 sum vóru konfirmeraði hendan dagin vóru: Anna Helene Margrethe Sofie Ingeborg Larsen (á Borðuni), Anna Martine Debes (á Borðuni), Hanne Cathrine Thomsen (Nólsoy), Christine Malene Susanne Jacobsen (Nólsoy), Brynhild Nólsoy (Kirkjubø), Kristine Petersen (Velbastað), Juliane Hansine Danielsen (Hestur), Martha Sofie Gertrud Jacobsen (Havn), Armgard Marie Kristine Elisabeth Egholm (Havn), Johanne Hansine Frederikke Hansen (Havn), Anna Frederikke Johannesen (Havn), Oluffa Sebelle Mørkøre (Havn), Mariane Elise Hansen (Havn), Johanne Sofie Pouline Mikkelsen (Havn), Johanne Petra Sofie Klein (Sanatoriið), Poul Nikolai Poulsen (Nólsoy), Niels Pauli Nicolaisen (Nólsoy), Mads Emil Joensen (Nólsoy),

Kornelius Kristian Sofus Reinert (Norðradalur), Zacharias Hansen (Syðradalur),

Hans Olaus Poulsen (Velbastaður), Niclas Sofus Jacobsen (Hestur), Johannes Frederik Johannesen (Hestur), Samuel Joen Anton Frederik Joensen (Kalbak), Johan Djurhuus (Havn), Erik Frits Simonsen (Havn), Johan Johansen (Havn), og Johannes Sigurd Frants Olsen (Havn).

Tey einastu vit kenna eru, aftasta rað f.v.: nr. 1. Erik Frits Simonsen (Havn), nr. 2. Mads Emil Joensen (Nólsoy), nr. 3. Johan Djurhuus (Havn), og nr. 7. Hans Olaus Poulsen (Velbastaður).

Miðraðið f.v.: nr. 1. Anna Frederikka Johannesen (Havn), og nr. 6. Poul Nikolai Poulsen (Nólsoy), og nr. 7. Johannes Sigurd Frants Olsen (Havn).

Fremst f.v.: nr. 1. Oluffa Sebelle Mørkøre (Havn).

Tey, sum kennast við onnur á myndini, eru vælkomin at ringja til Birgar Johannessen á tel. 314647 ella 214647.


· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



Ring og hoyr nærri

miðlahúsið
í Vágsbotni

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO
Sosialurin


## Dagurin

**14. mars. Euthycius,** deyður umleið ár 740. Tikin av døgum í Mesopotaniu.